# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Jóhan Thomsen, Sandvík** andaðist leygardagin 81 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni. Mánadagur, 20. juli - 18:20

**Danjal Jacob Mortensen Øravík** andaðist á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi sunnudagin, 87 ára gamal. Kistan fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi týsdagin kl. 18. Jarðarferðin verður úr Bønhúsinum í Øravík ónsdagin kl. 13. Sungið verður úr Sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Danjal Jacob, kunnu lata Bønhúsinum eina gávu.

**Mimi Petrina Olsen, Klaksvík** andaðist sunnumorgunin á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, 80 ára gomul.



**Dagurn**

**Dagurin 21. juli.**

**Evenus.** Grikska navnið Evenus er ikki at finna í halgimannatali, men er onkursvegna komið upp í álmanakkarnar frá 1727.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta - útgáva 2008)*

# Gullbrúðarpar við 100 ára gamlari mammu og vermammu

Tað man vera sjáldan, at fólk, sum eru komin so nógv til árs, at tey kunnu hava gullbrúðleyp, framvegis hava foreldur á lívi.

Men tað eigur Valdemar Lützen sum saman við konu síni Nannu hevði gullbrúðleyp seinasta leygardag.

Tey høvdu opið hús seinnapartin hendan dagin, og tá var mamma Valdemar, Ellen, við. Hon fylti 100 ár í mei og er framvegis væl fyri.

Valdemar og Nanna hava framvegis nakað at liva upp til. Ellen og Mogens náddu at vera gift í ikki færri enn 73 ár!

Vit vóru sjálvsagt á staðnum og fingu hesa myndina av gullbrúðarparinum saman við Ellen.

**ó.**



## Tøkk

Hjartans tøkk til tykkum øll, sum gleddu meg á 85 ára degnum.
Serstøk tøkk til øll, ið hjálptu til og gjørdu mær dagin so hugnaligan.
Harrin signi tykkum øll.

**Sofía Jacobsen**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá elskaða systir, mamma, vermamma og omma okkara

**Louisa Udbø Jensen**
Tórshavn

andaðist og var jarðað.
Takk til prest, Ann Dahl Hansen, fyri góð og troystarrík orð úti í Heiminum í Vallalíð og í kirkjuni.
Eina stóra tøkk til starvsfólkini í Heiminum í Vallalíð, at tit vóru so góð við mammu, ta tíðina hon búði har.
Tøkk fyri peningagávur, blómur og kransar.
Hjartans tøkk øll, ið hjálptu til á ymiskan hátt í sambandi við jarðarferðina og ervið.
Takk til tykkum mongu, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Jóhan, Sólrun og Eydna**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá kæri pápi, verfaðir, abbi og langabbi okkara

**Hjalmar Olsen**
við Rætt, Toftir

andaðist og var jarðaður.
Tøkk til Meinhard Bjartalíð og Martin R. Jacobsen fyri góð og troystarrík orð á Vesturskini og í kirkjuni.
Tøkk fyri blómur, kransar, gávur og heilsanir.
Tøkk til tykkum mongu, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.
Ein serstøk tøkk til starvsfólkið á Vesturskin.
Hjartans tøkk øll, ið hjálptu til á ymiskan hátt í sambandi við jarðarferðina.

*Familjunnar vegna*
**Eskilda, Sámal Petur og Vónbjørt**




